## Apan í Løkshøll

Einmansleikurin Apan, eftir Franz Kafka, verður spældur í Løkshøll sunnudagin 31. oktober kl. 15.30. Tað eru feðgarnir Egi Dam og Búi E. Dam sum á fyrsta sinni samstarvi í sjónleikarahøpi - Búi sum leikstjóri og Egi spælir Apan. Leikurin byggir á stuttsøguna hjá Kafka "Ein Bericht fur eine Akademie". Atgongumerki til leikin fáast á www.nlh.fo, í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovunum í Runavík, Tórshavn, Fuglafirði og Klaksvík. Kostnaður 150 kr.



## Konsert við løgum hjá Hans Jacob Højgaard

Sunnukvøldið 31. oktober kl. 18 verður ein konsert í Løkshøll í Runavík við løgum hjá tónaskaldinum Hans Jacob Højgaard av Toftum. Talan er um nýggjar útsetingar og improvisatiónir, ið taka støði í kendum og minni kendum løgum hjá Højgaard. Teir, ið framføra, eru: Hjalti Joensen, ið spælir kassagittar, Arni Carlsen, ið spælir hammond orgul og Kári Sverrisson (myndin), ið syngur og spælir ukulele. Konsertin varir okkurt um trý korter og kostar 40 kr.



**FJÓSIÐ**

*– Mær dámar sera væl at mála bygningar og landsløg, sigur Gunvá Justinussen. Her stendur hon frammanfyri eitt fjós og eitt hoyggjhús við Stein á Glyvrum. Myndin hevur ikki óvæntað heitið »Fjósið og hoyggjhúsið við Stein«*

hon og familjan búðu, áðrenn hon flutti longur niðan í bygdina.

– Hesa myndina eri eg ógvuliga væl nøgd við. Ikki minst tí, at hon hevur júst tað elementið í sær, sum eg royni at fáa við í hvørja einastu mynd – henda hugnan og friðin, sum teir serstøku og heitu litirnir skapa.

### Eitt kick

Nógv listafólk liva av list síni, men so langt er Gunvá ikki komin enn. Hon hevur í mong ár havt eitt minni vaskiarbeiði á politistøðini í Runavík.

Hinvegin verða ikki øll verk hennara seld, millum annað nógv av teim handaligu arbeiðunum.

– Eg eri soleiðis innrætað, at tá eg siti og bindi, fái eg so gott av tí sjálv inni í sálini. Tað løgna er, at tá eg so eri liðug við eitt plagg, so kann eg gott leggja so lítið í tað, at eg bara gevi tað til onkran.

– Tað er hetta, at kunna skapa nakað sum hevur mín áhuga, vísir Gunvá á. At tað er so, kunnu bæði døtur og ommudøtur hennara skriva undir uppá.

Úr hondum hennara eru komin nógv sera snøgg pløgg. Hetta hongur eisini saman við ynski hennara, um at hava høga góðsku.

Ella sum hon sjálvur sigur tað:

– Eg ynski veruliga, at tað sum eg lati úr hondum, og tað sum eg sýni fram, skal geva fólki eitt »kick«.

– Hetta »kick'ið« kann vera ein vakur kjóli ella ein vøkur taska, har tey siga »áh, sum tað er pent«. Tað er mítt hægsta ynski.

snorri@sosialurin.fo

## Bill er so jaglaður til

**Myndevnini eru løtt at finna, men hvussu fær Gunvá íblástur til at vera so virkin ein listakvinna? Jú, hesin íblásturin kemur í mangar mátar umvegis tónleikin.**

**– Eg havi altíð góðan tónleik afturvið, tá eg máli, slær hon fast. Tað eru ikki sangirnir hjá soninum Bill (*Justinussen, blðm.*), sum eg lurti eftir. Teir sangirnir eru so jaglaðir til, skal eg siga tær. Tað besta mær dámar, tað er sóritt relaxed og hugnaligt.**

**Henni dámar best tann friðarliga tónleikin. Henda friðin finnur hon í tí klassiska tónleikinum.**

**Serliga fegin er hon um fløguna »Við løkin« sum Jóannes S. Hansen gav út í fjør við klavertónleiki.**

**– Hon er sera hugnalig, skal eg siga tær.**